


www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 10 - 2011

# Oljulond ikki órógvað av prísfalli

Soleingi oljuprísurin heldur sær omanfyri 90 dollarar fyri tunnuna fer útboðið ikki at verða munandi broytt halda serfrøðingar. Hóast oljuprísurin liggur 20 dollarar undir táverandi metprísinum uppá 127 dollarar í apríl, er eingin panikkstøða í týðandi oljubýunum í Miðeysturi, Riyadh, Kuwait City ella Abu Dhabi skrivar Reuter tíðindastovan úr Dubai. Og myndugleikarnir í Saudi-Arabia, Kuwait og Sameindu Arabisku Emiratunum taka ikki fallið í oljuprísunum sum nakra hóttan, heldur ikki um prísurin skuldi lækkað enn meira. Ì dag er oljuprísurin góðar 100 dollarar fyri tunnuna. Hann er fallin við 17 dollarum síðani august. Ein leiðandi embætismaður í oljuumhvørvinum í Arabiska flógvanum sigur, at prísurin skal helst fara undir 90 dollarar og vera har í eina tíð, áðrenn londini fara at umhugsa at seta tiltøk í verk so sum at minka um framleiðsluna fyri á tann hátt at fáa prísin at vaksa aftur. Útlitini fyri at olja úr Libya aftur kemur á marknaðin, nú fyrsta oljulastin eftir at kríggið brast á, er farin úr Libya, er nú eisini farið at ávirka prísirnar. Libya roknar við at hava fulla framleiðslu aftur um gott og væl eitt ár. Hóast prísniðurgongdina í seinastuni halda flestu framleiðarar í Miðeysturi, at sjálvt ein oljuprísur uppá 90 dollarar er høgur.